## Løgmálaráðharri átalar fótbóltsspælara

Danski løgmálaráðharrin Lene Espersen segði við TV2 News í gjár, at fótbóltsspælarin Christian Poulsen eftir hennara tykki, átti at verið burturvístur frá landsliðnum í eitt longri tíðarskeið. Hetta eftir, at hann sló ein svenskan leikara við knýttum neva í dystinum við grannarnar úr Svøríki. – Tað verður trupult at sannføra tey ungu um, at harðskapur er skeivt, tá tey síggja professionellar spælarar, sum tjena milliónir av krónum, gera hetta undir dysti. Tílíkt kunnu vit ikki góðtaka, sigur Lene Espersen. Christian Poulsen er eisini meldar til løgregluna fyri tilburðin á vøllinum leygardagin.



## Smyril siglir til Runavíkar

Strandferðslan hevur syrgt fyri, at suðuroyingar mikudagin fáa møguleika at sigla til Runavíkar. Og á vegnum kunnu fólk í Streymoynni eisini fáa fart. Hetta í samband landsdystin móti Skotlandi á Svangaskarði, sum byrjar kl. 17.15. Smyril siglir av Tvøroyri kl. 7, 10 og 13, og fer av Havnini til Runavíkar kl. 15.45. Tá dysturin er liðugur, siglir Smyril úr Runavík kl. 19.45 og úr Havnini kl. 20.45. Forsøla verður á Farstøðini týsdagin og mikudagin

# spæli



Og hetta projektið kemur ikki at kosta 122 milliónir, tað sær ein og hvør við einum hálvum eyga. Tað kemur nærri at kosta minst 200 milliónir, sigur Jan Christiansen.

### Kongabrúgvin er heilag

Fyrrverandi borgarstjórin í Havn heldur at rættari var um býráðið varð tikið við í tilgongdina beinanvegin.

- So høvdu vit kanska sett ein arbeiðsbólk, sum kundi arbeitt við einari virðiligari loysn fyri kommununa og umsitingina. Og tá hevði mann í øllum førum ikki gjørt av at leggja ein stóran kassa úti á Kongabrunni, sum er heilag fyri havnarborgarar, sigur Jan Christiansen. Eisini førir hann fram, at um tingið vil byggja nýtt, so skal tað vera vælkomið.

- Men ger tað í samráð við býráðið, staðfestir hann, sum eisini heldur tað vera eina háðan móti Tryggingarsambandinum at byggja beint upp fyri vindeyguni á nýggja og stásiliga bygninginum hjá teimum.

- Harumframt er tað ein háðan móti okkara ungu og dugnaligu arkitektum at biðja ein gamlan pensioneraðan arkitekt um tekna nýtt tinghús, sigur Jan Christiansen hvassliga.

### Heðin var prísurin

Hann rópar alla verkætlanina fyri stórheitsvanvid og forfongd.

- At keypa tinghúsið fyri kanska 100 milliónir er enn eitt tekin um, at vit hava ein borgarstjóra, sum ikki hevur skil fyri pengum, og enn eitt dømi um, at Heðin er tann ringasti borgmeistarin, sum kundi verið valdur. Hetta eru flestu býráðslimir samdir við mær í, eisini teir, sum valdu hann, sigur Jan Christiansen. Og hann endar við at staðfesta:

- Men tey kendu prísin, tá tey kubbaðu á sinni. Heðin var prísurin fyri at sleppa undan at sita í minniluta. Tey kendu hansara forfeingiligheit, og bleiv hetta prísurin fyri teirra egnu forfeingiligheit.

**Rætting:**

*Í blaðnum í gjár, vístu vit tekningarnar av uppskotinum hjá Palla Gregoriussen. Av misgávum var endin á greinini ikki við, har Heðin Mortensen greiddi frá, hvussu umsitingin húsast nú:*

*Endin á greinini skuldi vera:*

*..Sosiala Deild heldur til í Meiarínum í Tórsgøtu. Tekniska deild og Byggi- og býarskipanardeildin eru í gamla posthúsbygninginum. Barna- og ungdómsdeildin eru yviri við køkubúðina. Roknskapardeildin er á Glade Hjørn, meðan starvsfólkadeildin eisini er á Vaglinum. So ongin ivi er um at vit húsast sera trongligt í býráðnum, sigur Heðin Mortensen.*

# Ymsar meiningar um nýtt tinghús

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*



## Høgni Hoydal

Sambært Høgna Hoydal, formann í Tjóðveldisflokkinum, eru tvær síður í málinum: Tað býarverkfrøðiliga og tað at hava eitt tignarligt parlament fyri landið.

- Fyri meg er ongin ivi um, at einar sjálvstøðugar Føroyar skulu hava eitt tignarligt parlament og ikki núverandi leivd frá amttíðini. Tí haldi eg, at vit skulu umhugsa tað gjølla, nær vit byggja eitt nýtt tinghús, sigur hann.

Burtursæð frá tí, so heldur Høgni Houýdal, at málið skal handfarast við opnum sinni.

- Málið má endiliga ikki enda við politiskari runublaking og stríði, eins og vit upplivdu tað seinast. Uppskotið sær spennandi út og eg eri opin fyri arkitekturinum. Serliga væl dámar mær hugskotið við vitanum og tað at leingja Áarvegin, sigur Høgni Hoydal.



## Annfinn Kallsberg

Anfinn Kalsberg, formann í Fólkaflokkinum, sær bæði fyrimunir og vansar við uppskotinum. Hann sigur, at tað er ein øgiligur munur á umstøðunum hjá tingfólki í dag, og tá hann varð valdur inn á fyrsta sinni.

- Sum so haldi eg ikki, at vit hava tørv á einum nýggjum tinghúsið beint nú. Men hinvegin, um Tórshavnar Býráð ætlar at byggja ein annan bygning til dømis á Skálatrøð, so er hetta kanska ein betri loysn, sigur Anfinn Kalsberg. Hann greiðir eisini frá, at millum tingmenn var positivur stemningur fyri húsinum fríggjadagin, men at hann skilur væl, um vanlig fólk halda tað ljóðar ørt.

- Nógvir tingmenn ynskja sær betri umstøður, og samanborið við onnur lond eru arbeiðsumstøðurnar sum heild verri her enn aðrastaðni, sigur Anfinn Kalsberg.



## Jenis av Rana

Tað er ein sera positivur Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, sum svarar í telefonini í morgun, tá hann verður spurdur um, hvat hann heldur um nýtt tinghús á Eystaru Vág.

- Hetta er virkuliga flott. Imponerandi! Ætlanin hjá arkitektinum er góð, og húsið kann gerast eitt prýði fyri býin og ein virðilig loysn fyri landið, sigur Jenis av Rana. Hann vísir á, at uppskotið er gott, um býráðið vil flyta yvir í tinghúsið.

- Verandi umstøður eru ikki nøktandi við Gamla Apoteki, sum er eitt sera ótíðarhóskandi hús í trimum hæddum, ið stendur leyst frá tinghúsinum. Løgtingið hevur tørv á einum tíðarhóskandi bygningi, so um tað fíggjarliga loysir seg, við at býráðið keypir gomlu húsini, so haldi eg tað vera sera positivt, sigur Jenis av Rana.

Vit hava roynt at fáa viðmerkingar frá hinum floksformonnunum, men teir vóru ikki at hitta í morgun.